# SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2007

Nevndin setti sær fyri at arbeiða víðari við málunum, sum vóru ásett fyri árið 2006.

1. **Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum**
2. **Dagføring av sjúkrarøktaretiskum leiðreglunum**
3. **At gera etiska ráðið meira sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
4. **Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av Talgildu Heilsuskipanini í Heilsuverkinum**

**Ad. 1 Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum.**
Afturat arbeiðinum við at dagføra etisku leiðreglurnar, sum krevur at arbeitt verður við etiskum tekstum, hava limirnir í nevndini Súsanna og Sigrun verið í Danmark saman við limum úr hinum norðurlendsku sjúkrarøktaretisku ráðunum á sera áhugaverdari ráðstevnu um etikk í sjúkrarøktini. Ein tílík ráðstevna verður hildin á hvørjum ári og tað verður mett at vera fakliga neyðugt at taka lut. Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað. Hetta hevur verið gjørt fyri at menna kompetensuna hjá limunum at viðgera tvístøður.

**Ad. 2 Dagføring av sjúkrarøktaretisku leiðreglunum**
Nógv orka hevur verið løgd í at arbeiða við dagføringini av etisku leiðreglunum. Etiska ráðið hevur havt 7 regluligar fundir. Á fundunum eru etisku leiðreglurnar viðgjørdar og serligur dentur hevur verið lagdur á at gjøgnumganga løgfrøðiligu leiðbeiningarnar, sum eru komnar frá løgfrøðingi til tess at tryggja, at vit ikki fløkja løgfrøði og etikk saman. Afturat tí eru kunnandi fundirnir lagdir til rættis. Allir limirnir høvdu hvør sín part av leiðreglunum at leggja fram. 4 kunnandi fundir hava verið kring landið. Vit hava vitjað Norðoyggjar, har fundur var í Klaksvík 23. okt. í Atlantis. 24. og 29. okt. vóru fundir í Havn á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. 30. okt. var fundur í Suðuroy í sjúkrahúskantinuni.
Luttakararnir kring landið hava verið 53 í alt. Fundarluttakararnir hava verið áhugaðir og tikið dúgliga lut í orðaskiftinum og eisini relaterað orðaskifti til teirra dagligu etisku tvístøður.
Fundirnir endaðu við, at limirnir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum hava mælt øllum sjúkrarøktarfrøðingum til at senda evni/tvístøður til etiska ráðið at viðgera. Eftir fundirnar hevur etiska ráðið eisini fingið teldupost við uppskotum til broytingar í etisku leiðreglunum.

Reaktiónirnar frá limunum verða viðgjørdar á komandi fundi, so tær kunna koma við í endaliga uppskotið, sum verður lagt fyri á aðalfundinum í 2008 til støðutakan.

**3. Gera sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**

Limirnir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum meta framvegis, at ráðið verður ov lítið brúkt, bæði av nevndini í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og av limunum yvirhøvur. T.d. hevur etiska ráðið heldur ikki seinasta árið fingið uppskot til lógir og reglugerðir til hoyringar.

Til tess at gera limirnar kunnugar við etisku leiðreglurnar eru bæði tær nú galdandi og uppskot til komandi lagdar út á heimasíðu felagsins. Ivasamt er tó hvussu nógvir limir síggja tær nú galdandi, tí tær liggja nakað djúpt inni í skipanini, og eru ikki lagdar, soleiðis at tær kunnu prentast út, uttan at alt møguligt annað kemur við. Komandi uppskotið liggur fremst á heimasíðuni og er sostatt lætt at finna. Herumframt hava vit latið tíðindaskriv frá etiska ráðnum í Vøku og á heimasíðu felagsins í sambandi við kunnandi fundirnar kring landið.

Vit meta, at tað tekur tíð at gera Sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar og at meira orka skal leggjast í tað komandi ár. Tó hevur Súsanna verið boðin við á fundum í tveimum umførum at viðgera etisk mál.

**4. Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av THS (Talgildu Heilsuskipanini í heilsuverkinum)**

Hetta er eitt øki, sum Sjúkrarøktaretiska ráðið ikki hevur gjørt stórvegis við seinasta árið. Sigrun hevur verið við á fundum í stýrisbólkinum fyri skjalfesting av sjúkrarøkt, har hon hevur lagt fram úrslitið av kunnandi fundinum, sum Sjúkrarøktaretiska ráðið hevði við Thomas Dam á várið 2006. Limirnir í stýrisbólkinum vóru ikki fult greiðir yvir hvussu mannagongdin viðvíkjandi trygdini við journallesnaði fungeraði – tvs. at til ber hjá starvsfólkum við kunnleika til persónlig nøvn og talupplýsingar hjá sjúklingum at finna journalina og lesa hana, hóast sjúklingurin liggur á aðrari deild. Sum úrslit av hesi kunning vildu limir í stýrisbólkinum kanna hetta nærri.

**Nevndarlimir til Sjúkrarøktaretiska ráðið**

Sjúkrarøktaretiska ráðið fekk tveir nýggjar limir várið 2007. Súsanna Olsen og Maiken Olsen tóku við aftaná Rutt Mikkelsen og Tórunn Patursson. Valskeiðið hjá limunum sær nú soleiðis út. Sigrun Wardum endurvald 2007 til 2011. Jana Mortensen 2005 til 2009. Súsanna Olsen og Maiken Olsen 2007 til 2011. Hildur við Høgadalsá 2006 til 2010.

# SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2007

**Komandi tiltøk.**

Sjúkrarøktaretiska ráðið fer nú at arbeiða við at leggja felags fundin galdandi fyri  norðurlendsku etisku ráðini til rættis. Fundurin verður hildin í Føroyum í sambandi við at SSN skal hava ráðstevnu her.

**Áheitan.**

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur fingið áheitan frá limum úr norska og danska Sjúkrarøktaretiska ráðnum um at gera sína ávirkan galdandi um samfelagsviðurskifti innan sjúkrarøktina. Ætlandi skulu ráðini í teim ymisku londunum gera eina felags niðurstøðu í tíðindabrævi, sum ætlandi skal sendast fjølmiðlum og politikarum. Áskoðanin á sjúkrarøktarfrøðingar og trotið á teir verður viðgjørt og heitt verður á myndugleikar at hava ein aktivan leiklut at bøta um viðurskiftini. Svøríki hevur boðað frá, at tey ikku kunnu taka lut, tí teirra umstøður víkja frá norsku og donsku. Okkara egnu viðurskifti líkjast heldur ikki, men vit halda, at vit eiga at stuðla fyri at vera solidariskar og eru vitandi um, at somu viðurskifti kunnu gera seg galdandi hjá okkum um nøkur ár.